SKÚLAFÓTBÓLTUR
6. flokkur
23. oktober 2019

Góðu næmingar og foreldur!

So gongur leiðin aftur suður í Marghøllina í Vági at kappast í Skúlafótbólti. Kappingin síðsta skúlaár hilnaðist okkum væl. Tá kom flokkurin aftur við tveimum steypum, tí bæði gentur og dreingir vunnu finaluna í mai mánaði. Men nú byrjar ein nýggj kapping, og 1. umfarið hjá **6. flokkunum verður mikudagin 23. oktober.**

Undirtøkan er stak góð. Tilmeldaði eru 28 lið úr skúlum í øllum landinum.

Vit í skúlanum við Løgmannabreyt hava meldað 7 lið til kappingina - 2 dreingjalið, 2 gentulið og 3 blandað lið.

Á heimasíðuni www.skulafotboltur.fo ber til at síggja, hvørji hini liðini eru. Leinkið er: http://skulafotboltur.fo/kappingar-urslit/6-flokkur/

Ferðaætlan

Næmingarnir møta í seinasta lagi **kl. 8.15 á Farstøðini.**

Farið verður suður við Smyrli, og verða vit á Krambatanga kl. 10.45. Bussar við átekningini ”Skúlafótbóltur” bíða á keiini og koyra okkum beinleiðis til Marghøllina, har vit verða umleið kl. 11.15.

Tá kappingin er liðug, og øll hava verið í Páls Høll, standa bussarnir klárir við Marghøllini og koyra okkum norður aftur á Krambatanga, har Smyril loysir frá bryggju kl. 18.45. Vit eru aftur í Havn uml. kl. 20.45.

Kostur

Av tí at dagurin verður heldur drúgvur, vilja vit mæla til, at øll hava etið ein góðan morgunmat, áðrenn farið verður suður. Harumframt er neyðugt, at tit taka ein stóran matpakka við t.d. breyð og frukt. Minnist eisini at hava ein drekkidunk við. Lummapeningur er loyvdur, tó í mesta lagi umleið 120,- kr.

Meðan kappingin er, bjóða fyrireikararnir ókeypis vatn og frukt. Nøkur hava bílagt døgurða, sum so verður latin í Marghøllini. Døgurðin kostar 70,- kr.

At minnast

Minnist til ítróttarklæði, drekkidunk, fótbóltsskógvar (gaggur) og skinnarar, ið er eitt krav! Um tit ætla at svimja, mugu tit taka svimjiklæðir + handklæði við, tí møguleiki verður at fara at svimja ókeypis í Páls Høll, áðrenn vit fara heimaftur. Um tit hava eina SVL-blusu, takið hana so við 😊

Eru ivamál ella spurningar, kunnu tit altíð senda eitt sms ella ringja til Høgna á tel. 214109 ella Mirjam á tel. 227041.

Blíðar heilsanir

Skúlin við Løgmannabreyt